Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Fiskiskapur eftir tunfiski

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er grundarlag fyri at skipa fyri royndarfiskiskapi eftir tunfiski í føroyskum sjóøki?
2. Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at skipa fyri royndarfiskiskapi eftir tunfiski í føroyskum sjóøki?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at áseta eina felagskvotu av tunfiski í føroyskum sjóøki?

Viðmerkingar:
Vit eru fiskivinnutjóð, og eigur tað eisini at síggjast aftur í, hvussu vit til eina og hvørja tíð eru klár til at gagnnýta okkara skiftandi sjófeingi uppá besta hátt.
Í okkara gróðrarríka havi kring Føroyar svimur eitt veldugt ríkidømi. Ein partur hevur verið til gagns í langar tíðir, ímeðan okkurt er heilt nýtt, sum t.d. at gagnnýta taran. Tó eru stórar nøgdir, við stórum virði, sum enn ikki hevur verið umsett til gagns fyri okkum, sum búgva her í Føroyum. Ein av hesum møguleikum er ein tunfiskur, atlantiskur bluefin (lat. Thunnus thynnus). Mest vanliga støddin á hesum fiski er 200 kg.
Atlantiskur bluefin hevur til ymiskar tíðir verið veiddur av londum kring Føroyar. Í 1990'unum vórðu royndir gjørdar eftir hesum fiski í føroyskum sjóøki. Eisini kann nevnast, at norðmenn hava fingið sín fiskiskap av atlantiskum bluefin góðkendan av altjóða stovninum ICCAT.

Hesin stovnur kann variera nógv í nøgd. Norra hevði eitt stórt fiskarí í 1950-unum og 60-unum, og tá vóru kvoturnar heilt upp í 15.000 tons. So kom ein tíð, har eingin tunfiskur varð veiddur.

Men nú er aftur nógv til av hesum tunfiski og okkara grannalond hava havt veiðu eftir atlantiskum bluefin aftur í fleiri ár. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 19. apríl 2021

Uni Rasmussen